# Tiltøk

**Sunnudagin 22. august**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Sonja Klein
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11
Ann D. Hansen. Í sambandi við, at sunnudagsskúlin byrjar aftur verður familjugudstænasta. Øll eru vælkomin til kirkjukaffi aftaná gudstænastuna.
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Bergur Debes Joensen. Talvan gongur fyri KFUK
**Argja kirkja:** kl. 11
Derhard Jógvansson. Talvan gongur fyri KFUK
**Christianskirkjan:** kl. 11
Magnus Brahé Jørgensen
**Hests kirkja:** kl. 12
Heri Joensen
**Gjógv:** kl. 11
Emil Olsen, messa
**Funningur:** kl. 12.30
Emil Olsen, messa
**Æðuvík:** kl. 11
Martin R. Jacobsen
**Sandur:** kl. 12
Jákup R. Hansen
**Tvøroyri:** kl. 11
Jónsvein Bech, familjugudstænasta
**Glyvra kirkja:** kl. 11
Meinhard Bjartalíð, altarg. Sunnudagsskúlin byrjar aftur. Kl. 20: Listaframsýning, Sigrun Gunnarsdóttir sýnir fram myndlistarøðina "Upp alt, ið Harrin hevur gjørt"
**Leirvík:** kl. 11
Niels Pauli Danielsen
**Miðvágur:** kl. 11
Inga Poulsen Dam
**Tjørnuvík:** kl. 12
Theodor E. D. Olsen
**Skála kirkju:** kl. 11
Símun Jacobsen
**Hvalba:** kl.14
Jónsvein Bech, familjugudstænasta
**Sumba:** kl. 11
Patrick de Neergaard, dáb
**Leiti:** kl. 12
Patrick de Neergaard
**Sandavágur:** kl. 11
David Johannesen, altarg.

**Lívdin**
Sunnudagur
Vælkomin á møti í skúlanum við Løgmannabreyt. Familjumøtið er kl. 10.30. Tilbiðjanarløta við breyðbróting kl. 11. Lovsongur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli og UngLív er eisini kl. 12. Á seinna møtinum sum er kl. 12 talar Richard Bauckham um evnið "Gud mín, Gud mín, hví ert tú farin frá mær." Barnaansing er fyri smáu børnini, meðan møtini eru. Eldru børnini kunnu fara í høllina at spæla meðan tilbiðjanarløtan og breyðbróting er. Møtini hoyrast beinleiðis á netinum

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman yviri við Strond**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Øll eru vælkomin

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/Gudny og Jørgen Andreassen

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, børn 8-12 ár. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14
Sunnudagsskúli. Kl. 18
Møti v/ Heri Kærbo.
Øll eru hjartalia vælkomin

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 23. aug. kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Sólrun og Per Poulsen. Evni: Gróðrarlíkindi.
Týsdagin 24. aug. kl. 17 í KFUK: Várgleði byrjar aftur eftir summarferiuna. Fyri juniorar og børn.
Mikudagin 25. august kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
Hósdagin 26. aug. kl. 19.30 í KFUK: Bíbiltími við Almu Bjartalíð.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti sunnudagsskúlin byrjar aftur.

**Frelsunarherurin**
Leygarkvøldið kl. 21 Útimøti á Sandoy.
Sunnukvøldið Kl. 18 Møti, Finnbogi Olsen talar
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Barnatúrur: Risahelli, Hósvík**
Sunnudagin verður barnatúrur frá Kunningarstovuni til Risahelli, Hósvík. Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 10. Havi heit og góð gonguklæðir og ein heitan munn við. Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425

**Samkoman Marknagil Fjalsgøta 2, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 10.30
Breyðbróting. Sunnudagsskúli kl.12. Kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18

**Fríkirkjan Oasan, Kirkjustræt**
Sunnudagin kl. 11
Guðstænasta v/ Vinjard Magnussen. Kl. 12 Sunnudagsskúli
Mánakvøldið kl. 20
Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia**
Leygarkvøldið Kl. 21 Flare
Sunnudagin Kl. 11
Morgunmøti, Sámuel Jacobsen talar. Kl. 13.15 SundagsKool

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Róland í Skorini talar. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti.

**Nólsoyar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 17 Møti v/ Karl Michaelsen.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Kedron, Vágar**
Møtir og tiltøk hjá samkomuni eru at síggja á heimasíðu okkara www.kedron.fo. Øll eru vælkomin í KEDRON. Hevur tú ikki hendan møguleikan, kunna tygum ogna tygum KEDRON-tíðindi.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 byrjar sunnudagsskulin aftur.
Møti kl. 18 v/ Solrun og Per Poulsen. Øll eru vælkomin

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Høgna Johannesen.
Sunnudagin kl. 11,
Morgunmøti við Jastrid og Paula Høj. Sangluttøka við Eyðun Jacobsen.
Vælkomin í Kelduna

**Tabor Toftir**
Sunnudagsskúlin samlast í Missiónshúsinum kl 14. Síðani verður farið inn á Svangaskarð. Havi matpakka við.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin

**Rituvíkar Missiónshúsið**
Leygarkvøldið kl. 20
Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 14
Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti

**KFUM & K í Klakvík**
Sunnudagin
kl.14.00 Sunnudagsskúli
kl.17.30 Bønarløta
kl.18.00 Sjómansmøti við Margar Toftegaard, Leirvíkingar syngja.
Náttverði verður aftaná kl. 21 Ungdómsmøti.

**Getsemane, Stangaskákið 1 Klaksvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Jan Joensen. Barnamøti er samstundis
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting

**Aglow Suðuroy**
Byrjað verður aftur eftir summarsteðgin í seinnu helvt av august.

**Frelsunarherinum í Vági**
Vegna serliga vitjan verður møti sunnudagin kl. 14.30.
Á møtinum vitjar Eysturoyar MC felag. Drekka verður aftaná møti. Øll eru vælkomin

**Vágur, Bethel**
Sunnukvøldið kl. 18
Á møtinum syngja og tala Eddie Bech og Svein Petersen

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*Tlf: 316491/286491*
*tilhald@torshavn.fo*
*Opið: mánadag-hósdag kl. 9-17 og fríggjadag kl. 9-16.*
Mánadagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur byrjar aftur 2. sept. Greta Ellingsgaard. Fimleikur verður mána- og hósdag kl. 10.
Kl. 11 Enskt talumál. Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Týsdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið
Kl. 10 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 15 Prát. Øll eru vælkomin.
Mikudagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 9.30 Fimleikur fyri monnum byrjar 1. sept. Dánjal Húsgarð. Fimleikur verður mikuog fríggjamorgum kl. 9.30.
Kl. 10 Bindiklubburin. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 15 Prát. Øll eru vælkomin.
Hósdagur
Kl. 9 Motiónsrúmið opið
Kl. 14 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Øll eru vælkomin.
Fríggjadagur
Kl. 9-16 Motiónsrúmið opið
Kl. 10 Bindiklubbur. Øll eru hjartaliga vælkomin
Kl. 14-16 Prát. Øll eru vælkomin.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Listasavnið á Sandi**
*Listasavnið er opið týsdag til sunnudag kl. 14-16.*
*Mánadag er stongt.*
Annars er opið eftir nærri avtalu, ið fæst við at ringja til Listasavnið á Sandi á tlf. 211924. Atgongugjald kr. 40,-

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin í Sandoynni stongt vegna summarfrí.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst.*
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*

**Dagtilhaldið í Gøtubrá**
Vit eru farin í summarferiu.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit eru farin í summarferiu.

**Eldrafelagið Nón**
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
*dagtilhaldid@post.olivant.fo*
*Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30 – 17.30*
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.
Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.
Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
er farið í summarfrí. Byrjað verður aftur í september.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
*Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í líkaviku frá kl. 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.*
Byrjar aftur 18. aug. vanliga tíð. Annars møtast ogur aftur í ólíka viku til somu tíð og sama stað.

# Heilsanir



**Hey Marjun omma**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 24. august.
Vit gleða okkum at koma í føðingardag leygardagin.
Eisini ein heilsan til abba.
**Ommubørnini**



**Góði elskaði sonur**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 22. aug.
Jesus pápi veri hjá tær.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða elskaða Halla**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 23. aug.
Jesus fylgi tær á leiðini.
Tú ert okkara gullklumpur. Vit elska teg yvir alt góða.
**Muss og klemm ynskja omma, abbi og Petur Frank**



**Góði fitti Jónas**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum sunnudagin.
**Muss og klemm frá Guðrun gummu**